# Brandur var bara bestur

**Brandur Karlson Jacobsen var ein klassa oman fyri hinar luttakararnar í fyrsta innleiðandi umfari av Singer/ songwriter kappingini í Hafnia Lounge leygarkvøldið**

SINGER/SONGWRITER
*Orð & myndir: Rókur Jákupson Jakobsen*

Leygarkvøldið var fyrsta innleiðandi umfar av Singer/songwriter kappingini í Hafnia. Fýra lagsmiðir skuldu kappast um rættin at koma í finaluna. Reglurnar eru, at luttakararnir skulu spæla minst tvey heimagjørd løg, og eitt triðja sum er valfrítt. Tey bæði heimagjørdu løgini skulu vera á føroyskum. Flestu luttakararnir nýta tað triðja, valfría lagið til at syngja eitt heimagjørt lag á enskum.

Fyrstur á pallin var Opur Torleifsson. Hann hevur ongantíð áður staðið á palli, og tess vegna var hann sjónliga nervøsur. Men hóast tað var hann stuttligur og nærverandi. Tað mesta av hansara tónleiki skal ikki takast í alt ov stóran álvara. Løgini vóru stuttlig, og man má rósa honum fyri at vera so djarvan at luttaka, hóast hann so at siga er óroyndur á palli.

Síðan trein Petur Háberg Jacobsen á pall. Hann hevur áður givið fløgur út, so hetta skakaði hann ikki tað minsta. Við eini professionellari framførslu var hann tryggur á pallinum. Hann syngur væl og reint, og so spælir hann eisini væl upp á guittaran. Løgini vóru vøkur og trygg. Kanska í so trygg. Ein sat onkutíð við eini kenslu av, at hansara tónleikur saknaði dynamik og øðrvísi hugsan. Tí hetta vóru góð løg, men tey vóru, sum áður nevnt, sera trygg



*Brandur Karlson Jacobsen vann 1. umfar av Singer/ Songwriter kappingini, sum varð hildin á Hotel Hafnia leygarkvøldið*

og pen. Petur hevði eisini onkur »hit« í skuffuni. Ongin ivi er um, at Petur er ein góður lagsmiður og sangari, og um hann ger tónleikin eitt sindur litríkari, verður úrslitið heilt spennandi.

Nú trínur Guðrið Hansen á pallin, og tað hoyrist millum áskoðararnar, at hon hevur nógvar fjepparar í salinum. Við hennara yndisliga sangi og country kenda guittarspæli hugtók hon fjøldina. Serliga meistraði hon lopið frá vanligari rødd og upp í falsettina væl. Hennara løg vóru rættiliga góð. Tó var tað triðja og seinasta lagið tað besta. Eg haldi, at lagið eitur »Nothing to write home about«. Hetta var eitt fangandi lag, og tú kundi ikki lata vera við at tralla við Guðrið. Tað verður sera spennandi at fylgja við tónleikinum hjá Guðrið Hansen komandi tíðina.

Síðstur á pallin var Brandur Jacobsen. Hann kenna summi frá 90´ara rokkbólkinum Ikaros. Tá ið Brandur legði út, var tað beinanvegin greitt, at her var talan um ein favoritt at vinna seg í finaluna. Hann megnaði meir enn nakar annar hetta kvøld at slíta skilnaðin millum ljóðføri og rødd og sostatt skapa tónleik í eini eind. Brandur syngur sera væl. Hann hevur fult tamarhald á framførsluni, og løgini, sum hann spældi, vóru spennandi og vøkur. Serliga lagið »Lands End« var gott. Vit kunnu fegnast um, at Brandur aftur gjørdi um seg á føroyska tónleikapallinum; hetta átti hann at gjørt oftari.

At enda fóru dómararnir at meta um framførslurnar hjá teimum fýra. Og vit kunnu ikki siga, at tað kom óvart á fjøldina, at Brandur vann umfarið. Hann var ein klassa omanfyri hinar luttakararnar, og hansara evni sum sangari og lagsmiður eru eyðsæð.




Á deildini starvast 8 málsviðgerar, 2 fulltrúar og 1 deildarleiðari. Av tí at talan er um eitt arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning, má tann ið sett/-ur verður, tola broytingar í starvsinnihaldinum.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið og lønt í lønarbólki 3.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Tummas Djurhuus, deildarleiðara, á telefon 35 35 10, ella á fartelefon 21 54 76.

## Málsviðgeri til Veitingardeildina

Hevur tú hug á royna teg í einum arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning? So er hetta møguliga nakað fyri teg. Eitt fulltíðarstarv sum málsviðgeri á Veitingardeildini á Almannastovuni, leyst at seta til 1. november 2005.

**Arbeiðs- og ábyrgdarøki:**

- Pensiónsmál, - útrokning, áseting og ávísing
- Dagpeningamál, - viðgerð, avgerð, útrokning, áseting og ávísing
- Forskotsrindan av barnapeningi viðgerð, avgerð, áseting og ávísing
- Uppihaldspeningur, - viðgerð, útrokning, áseting og ávísing
- Gera upp fíggjarliga partin, tá mál ganga út
- Aðrar uppgávur

**Útbúgving:**

- Skrivstovuútbúgving, merkonom, HH ella onnur viðkomandi útbúgving
- Starvsfólkið skal luttaka á innanhýsis útbúgving hjá Almannastovuni

**Arbeiðsroyndir / førleikakrøv:**

- Arbeiðsroyndir innan almenna umsiting ella líknandi starvsroyndir er ein fyrimunur
- Er fleksibul og hevur góð samarbeiðsevnir
- Evni og vilja til at arbeiða saman við øðrum toymum og miðstøðum
- Evni at hava yvirlit við at kunna arbeiða við fleiri kompleksum problemstillingum í senn
- Hava góð evni til at kunna umstilla seg tá broytingar henda
- Góð evni at orða seg bæði munnliga og skrivliga
- Hollan kunnleika til EDV og Windows Office programmini.

**Umsókn:**

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postsmoga 3096,
110 Tórshavn.

Í seinasta lagi mikudagin 26. oktober 2005.
Vinarliga merkið brævbjálvan: "Veitingardeildin".

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo